# Samtroling við MH

**Jákup Sverri, túrur nr. 2109**
**Tíðarskeið: 17/02-02/03 2021**
**Ábyrgd:** Petur Steingrund




**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa samanberandi tal tilfar at sammeta veiðuevni hjá Magnus Heinason á árliga yvirlitstúrinum av botnfiski við at taka somu trolstøðir samstundis. Áherðsla var løgd á at fáa arbeiðsgongdir uppá pláss eins og at taka sýnir av gulllaksi, longu, blálongu, flatfiski o.ø., sum vanliga ikki verður raðfest á hesum túrinum.*

---

### Samandráttur

22 støðir vóru tiknar, har av vórðu 21 góðtiknar. Skiftust um at føra/stýriborðsmegin í mun til Magnus Heinason. Vit høvdu nógvir byrjunar trupuleikar vóru á fabrikkini, men sum tíðin leið og fleiri og fleiri tov vóru gjørd fingu vit betur arbeiðislag á. Yvirlit yvir veiðuna, tal av nytrum og magakanningum er í Talvu 1.



### Um túrin

Eftir eina viku við ymsum seinkingum fóru vit av Havnini týskvøldið 24. feb kl 21. saman við Magnus Heinasyni, sum tá hevði verið inni og landa. Vit byrjaðu samtrolingina við at taka støðirnar úti á Sandoyarbanka og arbeiddu okkum norðureftir. Vegna keðiligt veður tóku vit innastu støðirnar eystanfyri leygardagin og siglu síðani norður um. Mánadagin høvdu vit skammlop í el-talvu, og neyðugt varð at avbróta túrin. Vit komu inn á havnina seint mánakvøldið 1.marts kl. 23.30 og landaðu morgunin eftir.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært túrætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3) og havtasku (bústig 1-5).

## Reiðskapur

Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, nýggjur rockhopper grunnur (24-24), 60 m breitlar og Seahunter vágslemmar (6,5$m^2$, 2 250 kg). Starmon oddi hita- og dýbdarmátari á fiskilínuni. SIMRAD TV80 sensorar á lemmum og fiskilínuni.

## Viðmerkingar

Hetta er fyrsti troltúrur við nýggjaskipinum og sum væntað vóru ymiskar barnasjúkur. Imponatorskipanin bleiv updatera við nýggjari versión tann 25. feb, og hevur síðani ikki havt stórvegis trupuleikar ella feilir, fyriuttan á Imponator 1, har framviging VO ikki riggar optimalt. 200kg vektin á imponator 1 vil ikki skáseta vekt omanfyri 40kg. Trupuleikar vóru við at sleppa av við veiðuna frá fabrikkini, serstakliga óskildari veiðu. Hetta er eyðsýnt við síðu lúkuni á dekk 2, sum hevur fingið skaða á túrinum. Hetta er allarhelst partur av at gera nýggjar mannagongdir umborð nýggjum skipið. Meiri ítøkiligar viðmerkingar um ymiskt, sum manglar og/ella uppskot til broytingar eru noteraðar. Túrurin er liðugt rættaður og er komin í databasuna.

## Fólk við frá Havstovuni

Hannipoula Olsen (kanningarleiðari).
Mourits Mohr Joensen, Sigvald Kristiansen, Poul Vestergaard, Luis Ridao Cruz, Emil Petersen.

*Talva 1. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag.*

| Fiskaslag | Kg í alt | Kg per tíma | Nytrur | Magar |
|---|---|---|---|---|
| Hýsa | 3964.81 | 146.84 | 442 | 98 |
| Svartkjaftur | 1122.22 | 41.56 | | |
| Gulllaksur | 1028.11 | 38.08 | 20 | 3 |
| Lítli kongafiskur | 912.43 | 33.79 | | |
| Hvítingbróður | 541.66 | 20.06 | | |
| Upsi | 528.14 | 19.56 | 73 | 26 |
| Longa | 460.31 | 17.05 | 63 | 5 |
| Toskur | 368.01 | 13.63 | 197 | 34 |
| Stóri kongafiskur | 333.03 | 12.33 | | |
| Hvítingur | 201.87 | 7.48 | | |
| Blálonga | 86.40 | 3.20 | 3 | 2 |
| Havtaska | 52.38 | 1.94 | | |
| Brosma | 46.81 | 1.73 | 5 | 2 |
| Tunga | 25.98 | 0.96 | | |
| Sild | 16.98 | 0.63 | | |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 2.57 | 0.10 | | |
| Igulker | 0.75 | 0.03 | | |
| Samanlagt | 3964.81 | 359.163 | 803 | 170 |